Bilar

Nr. 77 • hósdagur • 24. apríl 2003 • 77. árg.

# Nýggjur og størri Avensis

**Nýggjur Toyota Avensis er komin til landið. Talan er um ein bil, sum onki hevur til felags við forgangaran. Designið er smart og í evropeiskum stíli. Avensis verða gjørdir sum sedan, liftback og stationcar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Avensis er bæði longri og breiðari enn forgangarin. Aksilfrástøðan er eisini økt við 7 cm. Tá Toyota Carina bleiv til Avensis fyri umleið fýra árum síðan, vóru ikki tær stóru designbroytingarnar at síggja. Hesaferð er talan um ein heilt nýggjan bil. Tað verður alt meira vanligt at firmabilar og familjubilar hava sportligar koyrieginleikar. Vit hava sæð tað í fleiri av teimum nýggju bilunum, sum eru komnir á marknaðin í seinastu árini. Til undirvognin á nýggja Avensis hava Toyota brúkt sama koncept sum til sportvognin Celica. Tað eru ikki einans koyrieginleikarnir, teir hava gjørt nógv burturúr, designið er nýtt og í smartum evropeiskum stíli. Avensis er teknaður á ED2-designteknistovuni í Fraklandi, sum eisini hava teknað Yaris og Corolla. Avensis verður gjørdur í Burnaston í Onglandi. Nógv er eisini gjørt við, at bilurin skal verða so ljóðleysur sum gjørligt. Til tað hava teir brúkt nýtt ljóðdoyvandi tilfar, sum vigar nógv minni enn vanligt. At bilurin er sera væl gjørdur merkist bæði innan og uttan.

## Airbag til knøini

Bilurin fæst við tveimum ymiskum bensinmotorum, einum 1,8 litur við 129 hk og einum 2,0 litur við 147 hk, og einum 2,0 litur D-4D common-rail dieselmotori við 116 hk. Seinní í ár fæst hesin motorurin við nýggja umhvørvisvinarliga D-CAT filtrinum, sum minkar munandi um dálkandi útlátið frá útstoytinum. Bilurin fæst í útgávunum Terra, Sol og Executive. Standard útgerðin er sera umfatandi, so sum el-síðuspegl, hiti í setrunum og aircondition. Annars fæst bilurin eisini við t.d. við leðurratti, leðursetrum, 17" alufelgum, fartpiloti, Xenon-lyktum og el-stilling av setrunum. Umframt airbag framman, í síðunum og gardinairbag, hevur Avensis airbag til at verja knøini á bilføraranum við ein samanstoyt. ABS, EBD og antispinn er standard í øllum útgávunum. Bíligasti Avensis, 1,8 Terra, kostar kr. 244.600,-




*Ronny í Lon, sølumaður hjá Reyni Service, við nýggja Toyota Avensis*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Sum tað sæst á myndini, líkist nýggi Avensis ikki forgangaranum. Hesin hevur design í europeiskum stíli*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Toyota Avensis innan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Toyota Avensis 2.0 Sol VVT-i sedan**

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2.0 litur VVT-i 4 syl. 16V og 147 hk v. beinleiðis bensininnspræning |
| 0-100 km/t: | 9,4 sek |
| Bensinnýtsla: | 12,3 km/l |
| Dekkstødd: | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 463,0 cm |
| Breidd: | 176,0 cm |
| Hædd: | 148,0 cm |
| Eginvekt: | 1300 kg |
| Totalvekt: | 1900 kg |
| Prísur: | kr. 278.600 |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FR-188 Hoyvík<br>Tel. 343040<br>www. reyniservice.fo |

Navision Attain
Special Edition




Formula.fo bjóðar nú tú valumtøku bókhaldsskipanina Navision Attain til tær miðalstóru/smærru fyritøkurnar

Ein pakki er samansettur av øllum teimum vanligastu modulunum. Hesin pakki verður nevndur "Special Edition". Men tað er serliga prísurin sum er "special", tí hann er einans 50% av vanliga prísinum fyri hesi modul. Annars er einasta avmarking, at skipanin hægst kann útbyggjast til 10 samstundis brúkarar.

Um fyritøkan hevur ein fornt frá Navision, ber eisini til at dagføra hesa skipan til Special Edition, við teimum rættindum, sum fyritøkan annars hevur.

Vísir tað seg, at skipanin er ov lítil, ber til at dagføra til eina fulla versión av Navision Attain og fáa íløgura afturindaða. Fer dagføringin fram innan 12 mánaðir, er afturkeypsvirðið 100%, eftir hetta tíðarskeið er afturkeypsvirðið 75% av licensvirðinum.

Pakkin inniheldur hesi modul:

- Fíggjarskipan basis
- Fíggjarsetlan
- Debitor
- Sølufakturering
- Prísásetning
- Kreditor
- Keypsfakturering
- Goymsla
- Alternativir sølu prísir

Tilboðið er galdandi til 16. juni 2003

Um áhugi er fyri tilboðnum, ella eru spurningar annars, ber til at ringja til okkara og fáa fleiri upplýsingar á telefon 344000 ella við at senda ein teldupost til navision@formula.fo.

formula.fo



Pakkaferðir v. uppihaldi
fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur

Óhoyrd byrjunartilboð!



Danmørk:
Danland í Blokhus ella Hirtshals í 1 viku 5.995,-
Fráferð 16/5, 23/5, 30/5, 6/6, 13/6



Noreg:
Frítíðardepilin Pers Hotel í Gol í 1 viku 5.995,-
Fráferð 12/5, 19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 16/6, 23/6



Hetland:
Easterhoull Chalets í 1 viku 5.995,-
Fráferð 12/5, 19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 16/6, 23/6

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4 koyggju-kamari við wc/bað innv. og uppihald á einum av omanfyrinevndu støðum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo